
Kiwanis skipar fyri marknaðardegi:

Miniólav-søka úti á Reyni



MARKNAÐARDAGUR ÚTI Á TINGANESI 31.05.97

JAN MÜLLER

Nú mangt hevur ligið í dvala í mest sum eitt ár vekir tann ljósa tíðin og summarið nógv í okkum, sum so sæst aftur í útitiltøkum av ymsum slag.

Eitt tiltak, sum fyri fyrstu ferð sær dagsins ljós og sum - verður tað væleydnað - fer at vera ein fastur táttur í summartiltøkunum í høvuðsstaðnum - er stóri marknaðardagurin hjá felagsskapinum KIWANIS.

Hetta er spildurnýtt tiltak, sum limirnir í Kiwanis hava tikið stig til og sum teir vóna fer at verða endurtikið á hvørjum ári.

Dagurin er leygardagin 31. mai, og staðurin er býlngurin úti á Reyni í Havn.

Endamálið við at halda ein marknaðardag er rætt og slætt at lata øll tey mongu smáu og eisini meðalstóru áhugafeløg og limafeløg av ymsum slag, sum eru í býnum, at kunna gera seg meira sjónlig við at vera við í einum stórum felagstiltaki, sum fólk - bæði børn og vaksin - kunnu vitja og fegnast um.

-Fáur hevur í veruleikanum givið sær gætur, hvussu nógv felagsvirksemi er í Havnini. Tað er líkasum, at ítróttin hevur so stórar fastatøkur á fólki - einki ringt umítróttin - at pláss og stundir eru ikki til øll hini feløgini sigur ein av stigtakarunum.

Hann vísir á, at Kiwanis við hesum tiltaki hevur viljað hjálpt feløgunum við at samskipa eitt stórt tiltak sum hetta, fyri at fáa borgararnar í býnum at vísa hesum ans.

Nú er Kiwanis ein felagsskapur, sum hevur til endamál at hjálpa serstakliga børnum. Fleiri av feløgunum, sum eru við, hava eisini nakað við børn at gera. Innhaldið verður so sanniliga eisini nakað fyri børn.

Stongja part av Reyni av

Ætlanin er at „stongja" ein part av Reyni og økinum oman móti Vágsbotni av, soleiðis at her verður talan um eitt slag av stevnuøki.

Albert Isfelt arkitektur hevur skitsað upp (sí teknging), hvar hetta økið er og hvar tiltøkini verða. (Tað skraveraða.)

Bræv var sent út til umleið 80 feløg. Umleið 15 verða við. Millum hesi eru Giktafelagið, Nýrafelagið, GHM, Havnar Hornorkestur, Krabbameinsfelagið, ALV og skótarnir SSB.

Bátasmiður á Sandi hevur smíðað eitt fimmmannafær, sum verður lutað út. Kiwanis lutaði eisini føroyskan bát út í fjør og er ætlanin hvørt ár at lata føroyskar bátasmiðir kring landið smíða bát til slíkt tiltak.

Á stevnuni verða nógv tiltøk sum t.d. Bingjan hjá Trónda, Fuglafrøðifelagið hevur framsýning í Reynagarði, í Mettustovu verður framsýning av gomlum myndum, har verður so rørskreiðibreyt við kúlubað, har verður tombola, køkubingo, matsøla, hoppiborg, bjargingarroynd við Tyrlu fyri bert at nevna nøkur.

Úti á Bakka verður ein stórur pallur, har ymiskir fara at spæla, og har verður eisini undirhald.

Konsert og dansur

Um kvøldið verður so stór konsert í Gundadalshølini við bólkunum „Stowncald", „Present Plast", „Life" og „Hate Speech".

Eftir konsertina verður eitt rimmar fýrverkari á Tórsvølli. Sosialurin frættir, at her kunnu fólk vænta sær nakað sera flott. Klokkan 24 verður so gamlamannadansur í Gundadalshøllini við GHM og harmonikkuspælarum.

Tað fer at kosta 20 kr. at koma inn til marknaðardagin. Ógóðin fer til feløgini.

Marknaðardagurin verður settur av Jan Christiansen, varaborgarstjóra. Annars fer forsetin í Kiwanis, Áslak Jacobsen at seta stevnuna.

Byrjað verður klokkan 10 leygardagin.

Skráseting Føroya
hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:

Skrásetingar-nr.
P/f 714, **P/f Morning Star, 490 Strendur**

Lækkan av P/f-peningi viðtikið 13.11.1996 er nú gjøgnumført

Viðtøkur broyttar:
13.11.1996

Nýtt navn:
Sp/f Morning Star

Kapitalur:
Kr. 80.000,00

Nevnd:
Farin úr nevndini: Jóhanna Thomsen, 490 Strendur (formaður), John Thomsen, 490 Strendur og Johan Martin Hilbert Johansen, 490 Strendur

Stjórn:
Farin frá sum stjóri: John Thomsen, 490 Strendur
Innkomin sum stjóri: Jóhanna Thomsen, 490 Strendur

Tekningarreglur:
Felagið verður teknað av einum stjóra

Skráseting Føroya
tann 27. mai 1997

Kristin Balle

Skráseting Føroya
hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:

Skrásetingar-nr.
P/f 1334, **P/f Met, 100 Tórshavn**

Viðtøkur broyttar:
31.12.1996

Nýtt navn:
Sp/f Met

Kapitalur:
Hækking við
kr. 70.000,00 til
kr. 80.000,00
Inngjaldingarháttur:
Kr. 70.000,00 við skuldarumskifti til kurs 100

Nevnd:
Farin úr nevndini: Marit Petersen, Vesturgøta 20, 100 Tórshavn (formaður), Thormann Suni Kruse, Vesturgøta 20, 100 Tórshavn og Elfrida Kruse, 470 Eiði

Tekningarreglur:
Felagið verður bundið við undirskrift av stjóranum

Endamál:
Endamál felagsins er at reka handil og tænastu

Skráseting Føroya
tann 27. mai 1997

Kristin Balle

Skráseting Føroya
hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:

Skrásetingar-nr.
P/f 1455, **P/f Váðasteinur, 100 Tórshavn**

Viðtøkur broyttar:
14.10.1996

Nevnd:
Farin úr nevndini sum formaður: Sigrid Simonsen, R. C. Effersøesgøta, 100 Tórshavn
Innkomin í nevndina: Tórur Simonsen, Normarksvej 1, 4040 Jyllinge, Danmark (formaður)


Tekningarreglur:
Felagið verður teknað av stjóra saman við nevndarlimi, formanni saman við limi, ella allari nevndini

Skráseting Føroya
tann 27. mai 1997

Kristin Balle

Lýsið í **sosialinum**

Skjótasta heimatelda í Europa



Power Macintosh 6400/200 og 6500/250
hesi programm fylgja við:
· ClarisWorks · Claris Organiser · Claris Impact · HyperCard Player · Acrobat Reader · MacLink Plus · At Ease · The Grolier Multimedia Encyclopedia · The Ultimate Human Body · Apple Magic Collection, vol. 2 frá Disney Interactive · Thinkin' Things 3 · Volmers Videnskabshus · Full Throttle · Power Pete · The best of European Soccer

Power Macintosh 6400/200
· 200 MHz PowerPC, 603e RISC-processor
· 16 Mbyte RAM, kann viðkast til 136 Mbyte
· Internur 2.4 Gbyte harddiskur
· 15" skermur
· Knappaborð
· Innbygdir hátalarar, subwoofari og surround sound
· Innbygt CD-ROM-drev við 8-dupultari ferð
· Innbygt 28.800 bps-modem við fax, telefonsvarara og hondfriari telefonpassing
· Apple Internet Connection Kit
· Innbygd multimedia-akseleratión
· Descent

16.900,-

Power Macintosh 6500/250
· 250 MHz PowerPC, 603e RISC-processor
· 32 Mbyte RAM, kann viðkast til 128 Mbyte
· Internur 3 Gbyte harddiskur
· 15" skermur
· Knappaborð
· Innbygdir hátalarar, subwoofari og surround sound
· Innbygt CD-ROM-drev við 12-dupultari ferð
· Innbygt 33.600 bps-modem við fax, telefonsvarara og hondfriari telefonpassing
· Apple Internet Connection Kit
· Innb. multimedia-/ 3D grafikkakseleratión
· Actua Soccer frá Gremlin Interactive

21.200,-

Brekkutún 4 • Postboks 109 • 110 Tórshavn
Tlf. 1 1414 • Fax 17534

FARODANE